## Ferja ella tunnil til Kalsoy

Fyri mong ljóðar tað kanska sum ein ørvitisætlan at fara undir enn ein undirsjóvartunnil í Føroyum, og so til eitt øki við einans 123 íbúgvum. Christian vísir tó á, at hesin nýggi og komandi Kalsoyartunnilin hevur verið uppi og vent, og at eitt uppskot um ein slíkan tunnil eisini hevur verið á borðinum hjá Landsverki, tá málið um Norðoyatunnilin varð viðgjørt. Ein hugsan var tá, at ein átti at gjørt ein avstikkara til Kalsoynna, soleiðis at oyggin kundi verið knýtt upp í meginøkið. Henda ætlanin gjørdist kortini ikki til veruleika. - Tað hevði verið nokkso stuttligt, um ein tók hesa ætlanina fram aftur fyri at kanna, hvat hon hevði kostað, í mun til at skula skifta strandfaraskipið út, sigur Christian Andreasen. Hann vísir somuleiðis á, at Magni Laksáfoss var inni á eini líknandi loysn í sambandi við Suðuroyarleiðina, tá hann sat sum fíggjarmálaráðharri.



## Positiv ætlan fyri Kalsoy

Eftir at Christian Andreasen skrivaði brævið í fyri sløkum ári síðani hevur hann fingið fleiri afturboðanir frá fólki, sum eru positivt sinnað fyri hesi ætlanini. - Tey siga, eins og eg, at vit áttu at havt SAM í sigling í nøkur ár aftrat. Tí eg trúgvi, at nógv tey flestu vildu heldur behildið SAM enn at fingið eitt nýtt skip fyri einhvønn prís. Nýggj skip í dag eru kostnaðarmikil at byggja og dýr at reka. Harumframt krevja tey viðlíkahald – og oljuprísirnir fara neyvan at lækka í framtíðini!

# Oyggin hevði blómað við e

**Kalsoyingar eru ikki júst teir, ið skulu klaga um mangulin uppá tunlar. Teir fimm tunlarnir hava skapt lív og framtíð í bygdunum, men skal ein tosa um ta ultimativu loysnina, er fast samband til Klaksvíkar tað einasta rætta. – Ein slíkur undirsjóvartunnil hevði verið til gagns fyri allar kalsoyingar, sigur mikladalsmaðurin, Christian Andreasen**



SAMFERÐSLA

*Orð&mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Mikladalur:** - Eg eri fult greiður yvir, at vit fáa ongan undirsjóvartunnil enn á sinni. Men hetta er eitt mál, sum vit í øllum førum kunnu tjakast um, sigur mikladalsmaðurin ið er maskinmeistari av yrki.

Christian Andreasen sat í síni tíð í bygdaráðnum í Mikladali, og er í dag limur í serstøku Mikladalsnevndini, eftir at bygdin varð løgd saman við Klaksvíkar kommunu.

Eitt av hansara hjartamálum er at tryggja oyggjarfólkinum gott og reglugt samband við meginøkið. Hetta hevur hann ikki bert tosað um, men hevur eisini skrivað eitt bræv til kommununa um eina endaliga loysn til samferðsluna um Kalsoyarfjørð.

Hugskot hansara er at útseta bygging av nýggjum skipi og í staðin stovna ein grunn við stovnsfæi, sum skal hava til endamáls at bora ein tunnil, til dømis úr Knútsdali ella Syðradali á Kalsoynni og yvir á Bumshamar í Klaksvík.

Skriv hansara er nærmast at meta sum eitt upplegg til eitt tjak um samferðsluviðurskiftini til og úr oynni. Tí hvørki hann ella nakar annar veit til fulnar enn, hvussu langur ein slíkur kann verða, hvat hann kemur at kosta – og ikki minst, nær koyrandi verður undir Kalsoyarfjørð.

Christian Andreasen hevur í øllum førum sagt sína hugsan. Spurningurin er nú, um eitt konstruktivt tjak fæst í lag um hetta málið.




*Ein tunnil um Kalsoyarfjørð - úr Syðradali og yvir á Bumshamar - verður neyvan boraður í dag ella í morgin. Men fyri Christian Andreasen í Mikladali er hetta ein avgjørd treyt fyri framhaldandi menning í oynni*

### Gott skip

Í mong ár hevur Barsskor annars røkt farleiðina millum Klaksvík og Kalsoynna. Hóast skipið var gamalt, var hetta kortini álitið hjá fólkinum í oynni um tey ætlaðu sær inn á meginøkið.

Tað var tí ein stórur bati hjá Christiani og øllum hinum í oynni, tá strandferðslan fyri nøkrum árum síðani setti SAM í sigling millum Klaksvík og Syðradal.

Við hesum batanum kundu fólk fara fleiri ferðir um dagin til og úr Klaksvík. Ferðaætlanin varð haraftrat løgd soleiðis til rættis, at møguleiki var at búgva á Kalsoynni og arbeiða ella luttaka í ymiskum frítíðarítrivum í Klaksvík um kvøldið.

Kalsoyingar eru kortini so bjartskygdir – og realistiskir! – at teir duga væl at síggja, at tann besta loysnin fyri teir er at fáa ein tunnil millum Borðoynna og Kalsoynna.

Ein av talsmonnunum fyri hesi ætlanini er Christian Andreasen, sum fyri sløkum ári síðani sendi skriv um hetta málið til Klaksvíkar kommunu at arbeiða víðari við.

Ætlanin hansara gongur í stuttum út uppá loysn av tveimum viðurskiftum: Í fyrsta lagi, at hava SAM siglandi í eina tíð aftrat. Og í øðrum lagi at seta pening í ein grunn, til tess at fíggja ætlaða undirsjóvartunnilin.

- Vit eru púra sannførd um, at SAM er eitt gott skip. Skipið er stabilt, kann taka bilar og hevur verið serstakliga regulerur á rutuni. Tað er henda regularitetin, sum vit ikki á nakran hátt ynskja at missa.

- Men okkara hægsta ynski er kortini tað, at fáa eina varandi loysn innan samferðsluna, sigur mikladalsmaðurin.

### At liva við

Fólk eru fult greið yvir, at SAM sum varð bygdur í 1975 fer skjótt at fella fyri aldursmarkinum.

Tey eru eins greið yvir, at tann komandi ferjan verður av heilt øðrum slagi enn SAM: Loyvt verður ikki í framtíðini at hava ferðafólkini sitandi undir bildekkinum, og hetta kravið fer eisini at verða galdandi á Kalsoyarleiðini.

- Henda nýggja ferjan verður tí bæði størri, og uttan iva eisini hægri enn SAM. Og hetta fer at skapa trupulleikar, tá leggjast skal at við ferjuleguna í Syðradali.

- Hetta skipið verður nógv viðbreknari í siglingini enn SAM, tí tað fer at taka so nógvan vind á seg, sigur Christian Andreasen.

Eitt úrslit av hesum verður, at vandi er fyri fleiri avlýsingum á vetrartíð, tá vindur, sjóvarfall og myrkur gera um seg.

Júst avlýsingar eru eitt, sum fólkið tíbetur ikki hava verið von við: SAM er so mikið lágur, at tá hann fyrst er komin inn um grótkastið, so verjir tað fyri vindi og hann kann lættliga leggja til bryggju.

Hinvegin er SAM eitt opið skip, soleiðis at bilarnir, í ringum líkindum, fáa sjórok omanyvir seg. Men, sum Christian Andreasen tekur til:

- Tað er til at liva við, um ein ístaðin kundi sæð fram til eina varandi loysn – ein undirsjóvartunnil!